Kanningar vísa, at børn sum fáa bróst leingi, verða klókari enn tey, sum ikki sluppu at súgva hjá mammu síni fyrstu mánaðirnar
Mynd Jens K. Vang

Bróstabørn verða gløggari sum vaksin

Í nýggjastu útgávuni av "Ugeskrift for læger", verður vístá eina kanning, sum sigur, at tess longri eitt barn fær bróst frá mammu sínari, hægri verður intelligenskvotienturin

BØRN OG MENNING
Rúna Sivertsen

Kanningin byggir á eina intelligenstest, sum ein sálarfrøðingur hevur gjørt av nærum 1000 ungum kvinnum og monnum.

Eisini ein onnur kanning, ein sokallað Sessións-intelligenskanning, gjørd av 2300 ungum monnum, peikar á, at vitið hjá bróstabørnum verður betur ment.

- Jú longri børnini hava fingið bróst, tess hægri intelligenskvotient finna vit. Tí er sannlíkt, at tað er samband millum bróstageving og vitið, sigur Kim Fleischer Michaelsen, professari við Institut for human ernæring á Landbohákúlanum.

Sum eina møguliga orsøk, vísir hann á eina serstaka feittsýru í móðurmjólkini, DHA. Hendan er ein stórur partur av teimum feittsýrum, sum sita í membranunum í meginnervaskipanini - og DHA hevur møguliga eina gagnliga ávirkan á membranurnar.

Fleiri orsøkir

Donsku granskararnir hava roynt at tikið hædd fyri fyri øðrum viðurskiftum, sum kunnu ávirka intelligensin. Teir tora ikki við vissu at siga, at sambandið millum longdina av bróstageving og intelligensinum hjá barninum, ikki eisini kann hava aðrar orsøkir.

- Orsøkin kann eisini vera tætta sambandið millum mammuna og barnið, meðan tað fær bróst, sigur sálarfrøðingurin, Erik Lykke Mortensen.

Tað er væl hugsandi, at møður, sum hava orku at geva bróst leingi, eisini hava orku til at taka sær væl av barninum og menna tað betur enn mammur, har orkan skortar.

Sálafrøðingurin mælir mammum til at geva bróst í einar 8 mánaðir, tá bróstageving eftir ta tíð neyvan hevur somu gagnligu ávirkan.

Hóast kanningin greitt vísir, at bróstabørn eru betur fyri, tá tað snýr seg um intelligens, vísir Kim Fleischer Michaelsen, professari á, at máldi intelligensurin bara er ein lítil partur av teimum eginleikum, sum menniskjað hevur.

†

Tað verður kunngjørt at kæra mamma, kona, systir og omma okkara

Vilgerð Astridardóttir
Tórshavn

andaðist týsdagin 25. mars 63 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju leygardagin kl. 14.00.

Familjunnar vegna
Andrias og Manijeh

Tey, ið vilja minnast Vilgerð, kunnu lata eina gávu til Spedalskheitsmissiónina, konto í Føroya Sparikassi.

Ellisheimið sum ikki mundi komið

Í 1950 læt Jóannes á Heygnum í Klaksvík trød sína á Myrkjanoyri, fyri lítið og lætt, til bygging av ellisheimi. Nøkur ár frammanundan, beint fyri krígslok, høvdu menn tikið stig til at útvega gomlum í Norðoyggjum eitt heim. Men nógv ár skuldu ganga, áðrenn trøðin hjá Jóannesi varð brúkt til tað, hon varð ætlað til. Í samband við at Sambýlið á Heygnum herfyri læt upp, er spennandi søgan um áralanga stríðið nú komin út í bóklingi

BÓKAÚTGÁVA
Rúna Sivertsen

Tað er Freydis Poulsen í Klaksvík, sum eftir áheitan frá einum áhugabólki, hevur skrivað søguna um ellisheimið, sum ikki mundi komið.

Í samband við, at Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku í Klaksvík herfyri varð tikin í brúk, hevur Áhugabólkurin fyri eldri og gomul í Norðoyggjum givið út bókling, sum lýsir ætlanina at byggja ellisheim í Klaksvík og gongdina í málinum frá 1945-2002. "Søgan um Ellisheimið" telur 40 blaðsíður.

Í fororðinum sigur høvundurin, at munnligu keldurnar vóru fáar, nú so long tíð er fráliðin, síðani arbeiðið fyri einum ellisheimi í Norðoyggjum var størsta samrøðuevni millum fólk her.

Skrivligt tilfar

Av tí, at minnið oftast er svikaligt, gjørdi Freydis av at nýta skrivligt tilfar aftrat tí munnliga fyri at lýsa málið, sum tað var, tá tað var aktuelt.

Aftrat tí søguligi gongdini, hevur høvundin lagt størstan dentin á at vísa á tað samanhald og bjartskygni, sum var millum fólk í øllum heimunum í Norðoyggjum. Hetta var eitt mál, ið øll høvdu áhuga fyri og løgdu alla orku í at fáa framt.

Áhugavert er at síggja nøvnini á øllum teimum, ið sótu í nevndunum, sum vóru við í arbeiðnum. Eisini eru myndir av fleiri av teimum, sum stóðu fremst í stríðnum fyri at fáa savnað pening til ellisheimið.

Men, sum høvundin sigur, so er hetta bert ein lítil partur av øllum teimum, sum við vóru í arbeiðnum.

Bóklingurin, sum kostar 100 krónur, er at fáa í Búnanum og hjá Eilif Arge. Peningurin fer óskerdur til tiltøk fyri eldri í Norðoyggjum.

Bóklingurin, sum er sera áhugaverdur og væl úr hondum greiddur, er ein góð og bílig gáva, sum lýsir ein part av bygdasøguni hjá klakvíkingum.



Søgan um Ellisheimið er komin út í bóklingi. Bókin, sum telur 40 blaðsíður, kostar 100 krónur og er ein fitt gáva, sum lýsir ein part av bygdasøguni hjá klakvíkingum. Freydis Poulsen hevur skrivað og lagt til rættis. Peningurin fer óskerdur til tiltøk fyri eldri í Norðoyggjum.

Johannes Matras (á Heygnum) og konan Thomasia. Í 1950 læt hann trød sína á Myrkjanoyri til ellisheim. Fyri fáum døgum síðani, fleiri enn fimti ár seinni, kundu fyrstu búfólkini flyta inn í sambýlið á Heygnum undir Kráarbrekku í Klaksvík